# Um nakrar skónir í Føroyum.

(On some Lichens of the Faroe Islands).

*Eftir Jocelyn E. S. Townrow B. Sc.*[1])

## *INNGANGUR*

Í august mánaða 1958 vitjaði eg fleiri oyggjar í Føroyum til at savna skónir og er henda grein stutt frásøgn um úrslitið av hesum arbeiði. Einasti víttfevnandi listi yvir føroyskar skónir er hann hjá *Deichmann-Branth* (1901), og tað, sum her verður sagt, er ætlað sum uppískoyti til lista hansara.

Eg vitjaði flestu plantusamfeløgini í Føroyum, men kortini savnaði eg ikki allar staðir, t. d. ikki í bjørgunum og ikki millum norðurheimsvøksturin (har Papaver radicata m. a. grør) í Norðuroyggjum.

Skónasamfeløgini í fjøruni og á fjallatoppinum (Grimmiaheiðar) man ov lítið vera gjørt burturúr.

Til at lætta um komandi ávísingar er nummarið í *Watson's Census Catalogue* (1953) nevnt aftan fyri sløgini. Sløgini, Deichmann Branth ikki sá, eru merkt við einari stjørnu (*). Summi víða kend samnevni eru sett í klombur aftan fyri tey, sum nú verða nýtt. Eintøk av øllum teim nevndu skónasløgunum vera varðveitt á Føroya Náttúrugripasavni í Tórshavn.

---

1) Botany Department: University of Tasmania, Hobart.

## *LISTI YVIR SLØGINI*

1. *Streymoy:* Sjóvarkletturin millum Tórshavn og Hoyvík.

*Parmelia omphalodes* (L.) Ach. (78) eitt fruktandi eintak.
*Cetraria aculeata** (Schreb.) Fr. (*Cornicularia aculeata* (Schreb.) Ach. (109).
*Lecanora atra* (Huds.) Ach. (156).
*L. intricata** (Schrad.) Ach. (163).
*Ochrolechia tartarea* (L.) Massel. (*Lecanora tartarea* Ach.) (181).
*Lecanora lacustris** (With.) Nyl (*Aspicilia lacustris* (With.) Th. Fr. (214).
*Lecidea pilati* (Hepp) Koerb. (347).
*L. pelobotrya** (Wahl.) Leigh. (*Lecanora pelobotrya* Sommerf.) (363).
*L. macrocarpa* (DC.) Steud. (*Lecanora contigua* Fr.) (365).
*L. sorediza** Nyl. (*L. tumida* Massal.) (369).
*L. gothobergensis** Magn.
*Ramalina scopulorum* (Retz.) Ach. (*R. siliquosa* A. L. Sm ) (546).
*Lecania prosechoides** (Nyl.) Oliv. (*Lecanora helicopsis* (Wahl.) Ach.) (558).
*Xanthoria parietina** (L.) Th. Fr. var *ectanea* (Ach.) Oliv. (697).
*Caloplaca marina** (Wedd.) Zahlbr (*Placodium lobulatum* (Flk.) Flag.) (710).
*C ferruginea* (Huds.) Th. Fr. var. *festiva* (Ach.) Th. Fr. (*Placodium ferru-gineum* var. *festivum* A. L. Sm.) (732).
*Cladonia alpicola** (Flot.) Wain. (901).
*Cl. rangiformis** Hoffm. (907).
*Cl. coccifera** (L.) Willd. (913).
*Polyblastia* intercedens (Nyl.) Lønnr.

*Cladonia*= og *Cetraria aculeata* sløgini sóust í rivum við mójørð millum malargrót; hini sløgini sóust øll á naknum kletti, *Xanthoria parietina* nærstødd *Ramalina scopulorum*. Umleið 10 m y. sj., so at sjórokið vanliga ikki røkkur niðan.

2. *Streymoy:* Sunnari endi av torvmýru við Kirkjubøar-vegin umleið 4 km frá Tórshavnar bryggju.

*Placopsis gelida* (L.) Nyl. (121).
*Cladonia uncialis* (L.) Web. (881).
*Cl. subcervicornis** (Wain.) DR. (*Cl. cervicornis* var. *subcervicornis* Wain) (897).
*Cl. alpicola** (Flot.) Wain. (901).
*Cl. furcata* (Huds.) Schrad. (906).
*Cl. bellidiflora* (Ach.) Schaer. (915).
*Cl. digitata** (L.) Schaer. (916).
*Stereocaulon pileatum** Ach. (939).

*Peltigera canina* (L.) Willd. (994).
*Sphaerophorus globosus* (Huds.) Wain. (*S. coralloides* Pers.) (1252) fruktandi.

*Placopsis*= og *Stereocaulon* sløgini sóust á naknum bølling; hini sløgini vóru funnin í rivum ella gloprum við mójørð ella grasi (serliga Nardus stricta) millum bølling.

3. *Vágar:* Sjóvarkletturin í Miðvági.

*Parmelia saxatilis* (L.) Ach. (77).
*Ochrolechia parella* (L.) Massal. (*Lecanora parella* Ach.) (182).
*Lecidea macrocarpa* (DC.) Stead. (*Lecanora contigua* Fr.) (365).
*L. hydrophila* Fr. (*L. contigua* var. *cyanothalma* in Deichmann=Branth).
*Cladonia chlorophaea* (Flk.) Spreng. (*Cl. pyxidata* var. *chlorophaea* Flk.) (889).
*Cl. gracilis* (L.) Willd. (899).

Øll sløgini sødd omanfyri flóðarmálan, *Cladonia* sløgini í moldeygum, hini sløgini á naknum kletti.

4. *Vágar:* Á útsynningsbrekkunum niðan á Reynsatind, 400 m oman úr tindinum.

*Ceramia vermicularis* (Swartz) S. F. Gray (*Thamnolia vermicularis* Schaer) (50).
*Stereocaulon corallodies* Fr. (927).
*Solarina crocea* (L.) Ach. (1009).

5. *Vágar:* Suðurstrondin.

*Parmelia saxatilis* (L) Ach. (77).
*Cetraria islandica* (L.) Ach. (106).
*C. aculeata* (Schreb.) Fr. (*Cornicularia aculeata* (Schreb.) Ach.) (109).
*Ismadophilla ericetorum** (L.) A. Zahlbr. (613).
*Cladonia tenuis** (Flk.) Harm. (876).
*Cl. subcervicornis** (Wain.) DR. (*Cl. cervicornis* var. *subcervicornis* Wain.) (897).
*Cl. coccifera** (L.) Willd. (913).
*Sphaerophorus globosus* (Huds.) Wain. (*S. coralloides* Pers.) (1252.)

Øll sløgini sóust í skurvutum graslendi (serliga *Nardus stricta*), vanliga nærindis lítlum bøllingi, men sjáldan í tøttum svørði. *Icmadophilla ericetorum* var bara funnin

har hin tunni mógvurin undir svørðinum var berur og vaks hon tá á sjálvum mónum.

6. *Suðuroy:* Í ein landsynning úr Fámjin og uttanum.

a) Rivut hella har lívir eystan fyri Fámjin.

*Ramalina subfarinaceae** Nyl. (549).
*Anaptychia fusca* (Huds.) Wain. (*Physcia fusca* A. L. Sm.) (753).

b) Á klettum (basalt) við vatnsstrondina.

*Parmelia saxatilis* (L.) Ach. (77).
*Squamaria muralis** (Schreb.) Elenk (*Lecanora muralis* Schaer.) (114).
*S. circinata** (Pers.) Hook. (*Lecanora subimbricata* A. L. Sm.) (116).

c) Á berum mógvi í móbakkum.

*Baeomyces rufus** (Huds.) DC. (923).
*B. rufus** var. *subsquamulosus* Nyl. (923).

d) Á turrum svørði á móbakkum.

*Cladonia tenuis** (Flk.) Harm. (876).

e) Samanvavdir við slavnan svørð við ein foss.

*Peltigera malacea** (Ach.) Th. Fr. (993).
*P. canina* (L.) Willd. (994).
*Peltigera aphthosa* (L.) Willd. *Peltidea aphthosa* (L.) Ach. (1001).

7. *Suðuroy:* Gjóta har lívir (umleið 350 m) n. f. Tvøroyri.

*Crocynia membranacea** (Dicks.) A. Zahlbr. (957).

8. *Suðuroy:* Møl (basalt) í fjøruni, Froðba.

a) Beint omanfyri flóðarmálan.

*Lecanora poliophaea** (Wahl.) Ach. (137).
*Caloplaca marina** (Wedd.) Zahlbr. (*Placodium lobulatum* (Flk.) Flag,) (710),

b) Millum flóðar- og fjørumálan.

*Xanthoria parietina* (L.) Th. Fr. (697).
*Verrucaria mucosa* Wahl. (1264).
*V. microspora* Nyl. (1265).

9. *Borðoy:* V. f. Klakksvík (umleið 400 m.)

*Cetraria islandica* (L.) Ach. (106).

*Ochrolechia parella* (L.) Massal. (*Lecanora parella* Ach.) (182).
*Lecidea pantherina* (Ach.) Th. Fr. (317).
*Rhizocarpon alpicola** (Hepp.) Rabenh. (*Buellia alpicola* (Wahlenb.) Kremp.) (828).
*Cladonia sylvatica* (L.) Hoffm. (*Cladina sylvatica* (L.) Harm. emend. Sands.) (875).
*Cl. impexa** Harm. (879).
*Cl. uncialis* (L.) Webb. (881).
*Cl. subcervicornis** Wain. (897).
*Cl. rangiformis** Hoffm. (907).
*Baemyces placophyllus** Ach. (924).
*Stereocaulon vesuvianum* Pers. (*S. denudatum* Flk.) (932). with cephalodia.
*Peltigera rufescens* (Weis) Hoffm. (995).
*Psoroma hypnorum** (Dicks.) S. F. Gray (1010).

Øll tey nevndu sløgini, uttan *Psoroma hypnorum*, vóru funnin í vatndruknaðum svørði (serliga Nardus stricta og Sphagnum). *P. hypnorum* sást á turrari brattum.

## *NIÐURLØGA*

Deichmann Branth (loc. cit.) sigur, at *Cladonia cervicornis* man vera vanligasta skónin í Føroyum. Eg haldi, hann hevur blandað saman *Cl. cervicornis* og *Cl. subcervicornis.* Munurin teirra millum vísir seg í atburðinum saman við 50 % Kaliumlúti. *Cl. cervicornis* sýnir ongan atburð, men *Cl. subcervicornis* sýnir gula liting. Øll míni eintøk sýndu gulan lit, og eg fann onga óivasama *Cl. cervicornis.* Eisini nevnir hann hina barkkendu *Ramalina farinaceae*, men eg havi ikki funnið hetta slagið. Afturímóti havi eg funnið hina millum steina vaksandi *R. subfarinaceae* (í Fámjin), sum aftur ber til at kenna av atburði hennara saman við 50 % Kaliumlúti. Eg haldi, at *R. farinaceae* hjá Deichmann-Branth verunliga man vera *R. subfarinaceae.* Ein onnur ivasom skón er *Cladonia furcata* við tað at *Cl. rangiformis* ikki er við. Hetta eru tvey skónasløg torfør at greina, sum hava verið nógv samanblandað í eldri bókmentum. Eg havi funnið bæði og haldi,

at summi av teimum, sum Deichmann-Branth nevnir *Cl. furcato* munnu vera *Cl. rangiformis.*

So, sum eg kenni tær, eru tær føroysku skónirnar víðvíkjandi vakstrarstað at líkna saman við tær høgt uppi (600 m og hægri) í Britanniu, serliga í Skotlandi. Í Føroyum eru *Ceramia vermicularis* og í minni mun *Cetraria islandica* á *Rhacomitrium-Empetrum* og *Silene acaulis*-heiðum (har eisini Thymus serpyllifolia grør) við rundum svarðleysum eygum (av vindi), sum í the Cairngorms (Townrow (1961) og Poore & Mc. Vean (1957)). Munurin er, at í Føroyum koma hesi sløgini heilt niður á 400 m, *(C. vermicularis)* og 100 m *(C. islandica).* Afturímóti sóust *Stereocaulon coralloides* og *Solarina crocea* á Grimmia-heiðum á berum eyrblettum millum mosa (har tær kanska eru eitt stig í afturgerðini); men tað eg veit til, er einki heilt meinlíkt Grimmia-heiðum í Britanniu.

Fegin vil eg takka Mr. P. W. James, British Museum (Natural History) fyri stóra hjálp við greiningini og harra Jóannes Rasmussen, Náttúrugripasavnið í Tórshavn fyri at lesa mær handritið, og manni mínum fyri aðra hjálp.

## SUMMARY

Species lists and short ecologial notes are given for a collection of Faroese lichens. About a quarter of the species are new records for the Faroes.

## BÓKMENTIR

1. *Deichmann-Branth, J. S., 1901 in Warming, E. (Ed.) 1901—1908.* Botany of the Faeroes based upon Danish investigations. Lichenes. (i); 317—338, London.
2. *Duncan, U. K., 1959.* A guide to the study of lichens, 164+XXVII, Pls. 1—19. Arbroath.
3. *Poore, M. E. D., & Mc Vean, D. N., 1957.* A new approach to Scottish mountain vegetation. Jour. Ecol. 45: 401—439, figs. 1—7.
4. *Townrow, J. E. S., 1961.* Notes on some lichens collected in the Cairngorms. Lichenolo ist. London, 2: (in press).
5. *Watson, W., 1953.* Census Catalogue of British Lichens. Pubbl. Brit. Myc. Soc. 91+XIX, London.